# Hodja vil síggja onnur lond

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tríggjar bøkur – eina smábarnabók, eina myndabók og eina barnabók, Petur Kanin, Revaveiðan og Hodja úr Pjort**

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Smábarnabókin er um Petur Kanin – ein fingradukkubók. Tað er Beatrix Potter, ið skrivar bøkurnar um Petur Kanin. anna Maria R. Jensen týddi.

Her ber til hjá børnum at seta Petur Kanin, sum er ein dukka, ið fylgir við bókini, á fingurin og so hjálpa honum at leita eftir Kára Kanin í skóginum, í urtagarðinum og í bygdini. – Riða við fingrinum, og hjálp Peturi at tosa við vinfólkini, sum hann hittir á leiðini, verður mælt til á baksíðuni.

Bókin er 16 síður, prentað á haldgott papp og kostar kr. 98 í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Bókin er væl egnað til tey 0-3 ára gomlu.

Myndbókin eitur Revaveiðan, og er tað Sven Nordquist, ið hevur skrivað, og Niels J. Thomsen hevur týtt.

Hendan bókin er um Pettson gamla, frensin hjá honum, Findus, og nakrar hønur, sum búgva á einum lítlum bóndagarði. Ein dagin fáa tey vitjan av grannanum Gustavsson, sum ætlar sær at fara á revaveiðu. Hvat Pettson og Findus halda um hesa ætlanina, og hvat teir finna upp á fyri at bjarga bæði hønum og revi, kanst tú lesa um í hesi stuttligu bókini.

Bókin er 28 síður, innbundin og kostar kr. 95 í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Bókin er væl egnað til tey 4-7 ára gomlu

Barnabókin er um góða gamla Hodja úr Pjort, sum Ole Lund Kirkegaard skrivaði. Pauli Nielsen hevur týtt bókina til føroyskt

Drongurin Hodja býr í Pjort í Bulgislav. Har er gott at vera. Men Hodja tímir ikki at ganga heima. Hann vil síggja onnur lond. Á einum flogteppi sleppur hann avstað og kemur til høvuðsstaðin. Har verður teppið stolið frá honum. Men Hodja gevst ikki á hendur. Hann skal hava teppið aftur

Hodja úr Pjort er 85 blaðsíður, innbundin og myndprýdd við litmyndum. Bókin kostar kr. 120 í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Bókin er væl egnað til tey 8-12 ára gomlu.



*– Hygga har, segði Hodja. Hvør býur man hatta vera? Hann er størri enn allir hinir, eg havi sæð, segði Hodja, tá hann á sínum flúgvandi teppi nærkaðist Petto, høvuðsstaðnum í Bulgislav*

Eystara Bryggja · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 60 · Fax: 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



## Søkt verður eftir einum fólki til Farmadeildina







**Søkt verður eftir einum skrivstovufólki til avgreiðsluna á Farmadeildini. Starvið verður at seta skjótast gjørligt.**

**Starvið fevnir um:**
- Avgreiðslu av inngangandi farmi
- Kundaavgreiðslu
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Tollavgreiðslu

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært avtalu.

**Umsóknir:**
Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til:

***Smyril Line***
***c/o Heðin Joensen***
***Postsmoga 370***
***FO-110 Tórshavn***

ella við telduposti til:

hedinj@smyril-line.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 5. mars 2004.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen á tlf. 34 59 60.

Smyril Line varð stovnað í 1982, við tí endamáli at knýta saman londini í Norðuratlantshavi, Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveis, Beneluks, Fraklandi og Italiu.

Farmadeildin varð sett á stovn í 1998, við høvuðsskrivstovu í Tórshavn. Í Danmark hevur felagið farmastøðir í Hanstholm, Kolding og Hedehusene.

SMYRIL LINE

SMYRIL LINE






# Nýggjur landsstýrismaður og nýggir aðalstjórar

**Mikumorgunin var samkoma í Fiskimálaráðnum í samband við, at løgmaður, Jóannes Ejdesgaard, handaði Bjørn Kalsø, setanarbrævið sum nýggjur landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Á samkomuni greiddi løgmaður eisini frá teimum broytingum, sum framdar eru í miðfyrisitingini**

SAMKOMA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjørn Kalsø, sum er ættaður av Syðradali, men búsitandi í Klaksvík, hevur verið lærari við Ósáskúlan í Klaksvík. Saman við konuni, Hennibeth og børnunum, Steffan, Sørmundi og Símuni, var hann møttur í Fiskimálaráðnum gjáramorgunin at taka ímóti setanarbrævi og blómum.

Á samkomuni vísti Jóannes Ejdesgaard á, at Bjørn við hesum fær ábyrgd av einum stórum málsøki, sum er grundarlagið undir okkara samfelag.

Løgmaður ynskti nýggja landsstýrismanninum góða eydnu og vónaði, at samstarvið fer at verða gróðrarríkt. Hann segði, at Bjørn fer at fáa alla ta hjálp í starvinum, sum landsstýrið og embætisfólk nú einaferð kunnu veita honum.

- Eg vóni, tú verður verandi leingi í hesum starvi, legði hann aftrat og ynskti Bjørn tillukku við landsstýrissessinum.

Síðan greiddi løgmaður frá teimum broytingum, hann saman við øðrum landsstýrismonnum hevur framt í miðfyrisitingini.

Bjørn takkaði fyri álitið, honum er víst og segði seg vera fullgreiðan yvir, at fiskivinnan er eitt stórt og týdningarmikið málsøki fyri Føroyar.

- Eg eri ógvuliga spentur at byrja í hesum nýggja starvi, og eg vóni, at samstarvið verður gott, soleiðis at vit kunnu fáa nógv av skafti.

Bjørn segði, at tað fyrsta, hann nú fer at gera, er at seta seta inn í tey mál, hann er settur at umsita í landsstýrinum.



*Nýggi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, saman við konuni, Hannibeth, og børnunum, Steffan, Sørmundi og Símuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Herálvur og Kaj

Løgmaður hevur gjørt av at seta Herálv Joensen, sum hevur verið aðalstjóri í Oljumálaráðnum, í starv sum aðalsjóri í Fiskimálaráðnum. Samstundis er Kaj P. Mortensen, sum hevur havt leiðandi starv í Fiskimálaráðnum, fluttur í starv á Løgmansskrivstovuni, har hann skal virka sum serfrøðingur innan fiskivinnusamráðingar við onnur lond. Fyrisitingin av millumtjóða fiskirættindamálum verður samstundis flutt til Løgmansskrivstovuna.

Jóannes Ejdesgaard takkaði Kaj fyri tíðina í Fiskimálaráðnum og segði seg vænta, at hann fer at gerast eins hollur á Løgmansskrivstovuni.

Løgmaður rósti Herálvi Joensen fyri tíðina í Oljumálaráðnum, sum nú er niðurlagt. Hann segði, at leiðslan í Oljumálaráðnum við Herálvi sum aðalstjóri hevur arbeitt á professionellum støði.

Jóannes segði seg vænta, at Fiskimálaráðið fer at fáa nógv burtur úr hepnu hondini hjá Herálvi.

Herálvur, sum segði nøkur orð á samkomuni, helt skemtandi fyri, at politikarar fáa pening fyri at brúka munn, sum hann tók til, meðan aðalstjórar fáa pening fyri at tiga.

- Kaj og eg eru skyldmenn, og eg vænti, at vit fáa eitt gott samstarv.

Herálvur segði seg eisini fegnast um, at Sólja í Ólavstovu, sum hevur verið aðalstjóri í Almannamálaráðnum, nú fer at taka sær av løgfrøðisliga partinum í Fiskimálaráðnum.

- Eg haldi, at Sólja er ein vælskikkaður løgfrøðingur til starvið sum deildarstjóri, segði Herálvur Joensen.

## Broytingarnar

Løgmaður hevur annars gjørt av at seta Aibritt á Plógv, ið higartil hevur verið aðalstjóri í Familju- og heilsumálaráðnum, til aðalstjóra í nýggja Almanna-og heilsumálaráðnum

Sum nevnt er Oljumálaráðið niðurlagt, og tað er Løgmálaráðið eisini. Í staðin er Innlendismálaráðið sett á stovn við Rúna Joensen sum aðalstjóra. Rúni hevur annars verið aðalstjóri í niðurlagda Løgmálaráðnum.



*Løgmaður hevur handað Birni setanarbræv og blómur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Sólja í Ólavstovu er nú deildarstjóri í Fiskimálaráðnum, Herálvur Joensen, aðalstjóri í Fiskimálaráðnum, Bjørn Kalsø, landsstýrismaður og Kaj P. Mortensen, sum nú starvast á Løgmansskrivstovuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*